

# ...uroyggj...

av gomlum leivdum frá alivinnuni. Sama er skilið í Víkarbyrgi har ljóta skrímsli av einari gamlari smoltstøð órogvar gamla bygdarlagið.

Hvør eigur hesi gomlu rovini? onkur peningastovnur vælsaktans – fái hetta burtur ongantíð ov skjótt. Vaknið, tit sum varða av ferðamannavinnuni í Suðuroy.

Vinmaðurin og eg frøðast um útsýni av Heystinum. Beinisvørð í øllum sínum veldi og so kappabygdin Sumba. Pól F, Seggjasøgur, tá menn vóru mannfólk og dirvi og sjálvbjargni vóru stavnatekin. Vit fara norður eftir til Hvalbiar. Snopprikur, Giljabóndin, Sjórænarir, Káragjógv, søgan livir. Gjøgnum okkara elsta berghol sum ídag er vandamikið og ein forðing fyri vinnulívsmenning Tað er at vóna at toska-alingin í Hvalba fer at roynast væl. Vinmaðurin hevur ikki verið á Fiskieiðinum áður. Hann verður hugtikin av stórslignu náttúruni og av søguni um harðbalnan útróður og bardagin fyri at lívbjarga sær og sínum. Ein annar heimur enn okkara altjóðagjørda Tórshavn har íleggjarar og coachar hava hægri status enn innløgumaðurin.

Um eg nú skal taka munnin rættuliga fullan so tori eg at siga at stórur partar av allari menning í Føroyum er sprottin úr Suðuroynni og við fólki sum hava røtur í oynni. Tað vóru suðuroyingar sum við skipinum Føroyingi lótu heimin upp fyri Føroyar og tað var vinnan í Suðuroynni sum legði lunnar undir ta vælferð vit hava ídag. Suðuroyingar vóru altjóðagjørdir fyri hundrað árum síðani, langt áðrenn nakar norðanfjørðs visti hvat hetta heitið merkir.

Tíanverri er Suðuroyggin ídag dragnað burturúr restini úr Føroyum. Vinnan hevur tað ikki gott. Tað er trupult hjá fiskivinnuni uppá mangar, ikki minst við avskipingarmøguleikum og arbeiðsmegin gerst eldri, tey ungu flyta. At Strandferðslan bleiv privatiserað var enn eitt stórt bakkast fyri Suðuroynna siga teir.

Suðuroyingar eru lættir av lindi og skjótur til verka og til kreativa nýhuxan, men kortini kennir tu ein farra av uppgávulyndi og apati tá tosað verður um støðuna og framtíðina. Samstarvsandin millum suðuroyingar kundi verði betur, halda teir og at oyggin varð ein kommuna. Tosar ein við ungar, vælútbúgvnar suðuroyingar við børnum norðanfjørðs er niðurlagið at tey fegin vildi flutt suður aftur, men har er onki at fara til !

Í tosinum um eitt valdømi kan nevnast at hetta valskeiði hevur Suðuroyggin, umframt Løgmannin, havt tríggjar løgtingslimur umframt at fleiri suðuroyingar eru í Landsstýri og á Tingi. Ikki verður mett at henda massiva suðriska umboðanin norðanfjørðs hevur verið til størri gagns fyri Suðuroynna. Vinnan sigur seg ikki hava nakað samband við fólkavaldu umboðini.

Tað krevst eitt ódnartak at fáa Suðuroynni við aftur. Setið 100 mio av til økismenning. Hugsið stórt og øðrvísi: Spælikasino, micro- ølbryggjarí, øko laksaaling og toska aling, laxaroyking, gastronomi, vistfrøði saga-slóðir, konference-ídnað, tjóðarpark, frið og kvirru, mentan. Nakkur á Tvøroyri hevur nógvar møgulleikar á hesum øki.

Loyvið Smyrli at sigla hvørt vikuskifti um summarið til Aberdeen. Tað fer at gagna allari útflutningsvinnuni í landinum og fáa nógv fleiri ferðafólk til Suðuroynna. At minka partafelags og persónsskattin í nøkur ár í Suðuroynni so at tað gerst áhugavert hjá nýggjum vinnum at etablera seg har er eisini ein møgulleiki, slíkur skattalækki er td., í Norður Noregi. Tá oljan verður funnin er Suðuroyggin sjálvsøgd at hava oljuterminal. Er hetta órealistiskt tos, whishful thinking? kanska, men eitt nýtt ættarlið av ungum, vinnulívshugsandi suðuroyar politikarum fara gera munin.

Tørvur er á einum “think tank” av fólki norðanfjørs sum vilja oynni væl og sum kreativt og nýhuxandi kunnu stuðla vinnulivi og politikarum.

Nú gjørdist hetta ein nakað negativir epistul, men tað er mín staðiliga vón, at Suðuroyggin aftur gerst eitt blómandi samfelag heldur enn ein kolonihavi og Shangri La hjá suðoyringum í exili. Heldur enn bert at hyggja at Havnina eiga suðuroyingar at snúgva sær suðureftir og lata alheimin upp sum teir gjørdu áður.

Vit sigla úteftir Tvøroyrarfirði. Eg sigi vinmanninum frá góðum summardøgum Undir Heygnum fyri skjótt nógvum árum síðani. Eg drekki pappkaffi og hugsi um míni sum hvíla seg millum blómurnar við Tvøroyrarfjørð. Sic transit.